# NA UTTAN RES

At byrja við var suppan bara ætlað teimum. Men líkt var til, at onnur eisini mungaðu eftir hesi bátasuppuni, so nú fáa øll somul hesa góðu suppu.

– Ta einu ferðina ótu omanfyri 500 fólk suppu. Tað vísti seg tó, at undirtøkan bara vaks og vaks. Og tá vit serveraðu mest, vóru omanfyri 1500 fólk til suppu, greiðir Eyðun íðin frá.

Borðreiðingina hava tey havt á ymiskum støðum. Men nú hava tey leigað eitt stórt tjald frá Bátafelagnum á Toftum, soleiðis at øll hesi mongu fólkini kunnu eta suppuna innandura.

### Bíleggja pláss

Í summar verður Vestmanna vertur fyri tveimum stevnum – Bátastevnuni og Fjarðastevnuni.

Henda fyrra stevnan snýr seg jú fyrst og fremst um bátar, tí uttan bátar, var eingin bátastevna. Og tað er ikki frítt, at fyrireikararnir hava staðfest økta undirtøku ár undan ári.

Á fyrstu stevnuni í 2002 vóru einir 70 bátar, og tá teir taldu flestar bátar vóru teir so mangir sum 225.

Tað skal sjálvandi eitt stórt fyrireikingararbeiði at skipa eina slíka stevnu so gott og ikki minst so trygt sum tilber. Men við árunum er hesin parturin øktur í sama mun sum talið av bátum er økt.

Tað hevur verið trupult at meta um, hvussu nógvir bátar koma á hvørjum ári, tí veðrið hevur spælt sín avgjørda leiklut her. Í ár hevur ein tó møguleika at fáa eitt heldur betri yvirlit yvir talið av bátum.

– Ja, vit hava í ár givið báteigarunum at bíleggja sær fast pláss við bátabrúgvarnar. Hetta gjalda teir fyri, meðan fleiri onnur pláss eru ókeypis, vísir Eyðun Leo á.

### Hugni

Tá talan er um skránna fyri Bátastevnuna, so víkur hon á rættiliga nógvum økjum frá skránni fyri eina vanliga summarstevnu.

Á slíkum summarstevnum eru skráin mangan á tremur við alskyns tiltøkum hjá fólki at fara til. Men í Vestmanna er øðrvísi, hóast nógv hava spurt seg fyri um at hava eitthvørt tiltakið á hesi stevnuni.

– Vit hava lagt skránna soleiðis til rættis at tað eru fá tiltøk, soleiðis at fólk skal kunna hugna sær saman. Vit vilja ikki at tað skal vera nakað res, sum Eyðun Leo tekur til.

Og hann leggur aftrat: – Vit ynskja ikki at fólk skulu ganga og renna frá einum tiltaki til eitt annað. Tey koma higar fyri at hugna sær, og tað skulu tey eisini sleppa.



BÁTAR

*Talið av bátum er bara vaksið ár undan ári. Teir koma allastaðni frá*

# Soleiðis byrjaði tað ...

**VESTMANNA – Ætlanin hevur alla tíðina verið, at tiltakið skuldi ikki vera avmarkað til nakran ávísan ella nakrar ávísar áhugabólkar, sigur Jógvan Sigurd Hóðará. Hann var formaður í VÍF í 2002, tá stig vórðu tikin til fyrstu Bátastevnuna í Vestmanna. Jógvan Sigurd Hóðará skrivar soleiðis:**

Hugskotið til Bátastevnuna kom ein dagin, Birgir Waag Høgnesen spurdi, um vit (eg var formaður í VÍF) ikki skuldu gera okkurt serligt tiltak at savna pening inn til Undirhúsið, sum hann hevði verið við til at seta á stovn – og til VÍF, sum jú altíð hevur tørv á peningi.

Ætlanin var, at tiltakið ikki skuldi bera dám av eini vanligari summarstevnu og skuldi vera avmarkað til nakran ávísan ella nakrar ávísar áhugabólkar. Hann hevði hugsað um ymiskt, m.a. eina bátastevnu.

Birgir kom oman til okkara eitt kvøldið, og vit settu okkum niður at tosa ymisk hugskot ígjøgnum, og vórðu samdir um, at ein bátastevna mátti verðið spennandi. Hetta komst eisini av, at hon kundi verðið relaterað til Undirhúsið, samstundis sum tiltakið fyri VÍF kundi verðið relaterað til kappróðrarneystið, ið var farið í gongd.

Vit hildu hetta verða so mikið spennandi, at eg lovaði at leggja hugskotið fyri nevndina hjá VÍF til støðutakan. Nevndin helt eisini, at hetta hugskotið var sera spennandi, og varð avgjørt at fara undir fyrireikingar til eina bátastevnu.

Av tí at tað var avmarkað, hvat persónarnir, ið dagliga vóru í Undirhúsinum, kundu vera við í fyrireikingunum, tók VÍF sær av meginpartinum av tí fysiska partinum, meðan Birgir tók sær av tí allarmesta á tí praktiska økinum, so sum kunning, reklamum og øðrum, sum Birgir eisini er sera dugnaligur til.

»Manningin« í Undirhúsinum hevði eisini onkrar uppgávur, so sum framsýning av gomlum myndum og modelskipum.

Hetta var í høvuðsheitum starturin uppá tað fyrstu Bátastevnuna, ið fekk navnið »Kjalarvatn« – eisini eftir hugskoti frá Birgiri.

snorri@sosialurin.fo



BYRJAN

*Bátastevnan byrjaði í 2002 og verður nú hildin 9. árið á rað*